# Avrætting forðar ferð

Forsetin í Meksiko, Vincente Fox, avlýsti í gjár eina ætlaða ferð til amerikanska statin Texas fyri at mótmæla, at myndugleikarnir í statinum hava avrættað ein meksikanskan ríkisborgara.

Tann 33 ára gamli Javier Suarez Medina varð avrættaður í Texas mikudagin. Hann var dømdur til deyða fyri at hava myrt ein løgreglumann í býnum Dallas í 1988. Suarez viðgekk morðið, men helt uppá, at hann visti ikki, at maðurin var løgreglumaður.

Vincente Fox, forseti og ST-mannarættindakommiserurin, Mary Robinson, bóðu guvernørin í Texas veita meksikanaranum grið, men tað vildi guvernørurin ikki. Meksikanski forsetin er misnøgdur við, at myndugleikarnir í Texas vildu ikki lata Suarez seta seg í samband við meksikansku umboðsstovuna í Dallas, soleiðis sum altjóða lóggáva annars fyriskrivar.

# Sleppa til Svøríkis

Svensku innflytaramyndugleikarnir hava gjørt av at gera tað lættari hjá palestinskum flóttafólkum at sleppa til Svøríkis.

Í meiri enn eitt ár eru palestinsk flóttafólk ikki sloppin til Svøríkis, men upplýsingar frá svensku sendistovuni í Jerusalem hava fingið stjórnina í Stockholm at broyta reglurnar.

Stjórnin hevur tó ikki tikið støðu til, hvat hon skal gera við fleiri hundrað palestinar, sum eru í Svøríki, og sum bíða eftir at fáa at vita, um teir fáa uppihaldsloyvi har. 200 hava fingið at vita, at teir fáa ikki uppihaldsloyvi og bíða nú eftir at verða koyrsir úr Svøríki.

# Illir sløkkiliðsmenn

Fakfelagið hjá amerikansku sløkkiliðsmonnunum biður nú allar sínar limir halda seg burtur frá einum ætlaðum minningarhaldi til minnis um sløkkiliðsmenninar, sum doyðu í yvirgangsatsóknini 11. sept. fjør. Fakfelagið er í øðini inn á Bush, forseta, tí hann hevur sýtt fyri at hækka játtanina til sløkkiliðini.

Forsetin skal halda røðu á einum minningarhaldi, sum verður í Washington tann 6. oktober, har ætlanin er at minnast allar amerikanskar sløkkiliðsmenn, sum eru deyðir í arbeiði hetta seinasta árið. Teirra millum eru teir 343 sløkkiliðsmenninir, sum doyðu í World Trade Center og Pentagon.

Men fakfelagið biður nú limirnar halda seg burtur frá minningarhaldinum. Felagið hevði biðið forsetan um 2,5 milliardir krónur til nýggja útgerð og til at kanna sløkkiliðsmenninar, sum sluppu livandi frá yvirgangsatsóknini, men forsetin hevur sagt nei.

# Deyðiligt kvinnubit

Ein ung kvinna har eysturi í India varð um dagarnar bitin av einari kobraslangu, men kvinnan gjørdi ikki mætari enn at bíta slagnuna. Úrslitið av dystinum var, at slangan doyði. Kvinnan fekk viðgerð á einum sjúkrahúsi og hevur tað gott.

Indiska tíðindastovan skrivar, at tann 25 ára gamla kvinnan lá og svav, tá slangan kom inn í kamar hennara og beit hana. Men ístaðin fyri at fjala seg legði hon á tann óbodna gestin og beit slanguna so fast, sum hon fekk.

Kobraslangur eru rættiliga vanligar í Suðurasia og verða roknaðar sum sera vandamiklar. Søgnin sigur, at tá egyptiska drotningin Kleopatra hevði gjørt av at taka lívið av sær, lat hon eina kobraslangu bíta seg.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# So fór Dresden undir

**Í týska býnum Dresden er Elben farin langt upp um áarbakkarnar, og myndugleikarnir vænta, at áin fer at veksa uppaftur meiri**

VATNFLÓÐ Í EVROPA
*Árni Joensen*

Týsku myndugleikarnir noyddust í gjár at lata tyrlur og hernaðarflogfør flyta umleið 400 fólk av sjúkrahúsunum í býnum Dresden, tí vandi er fyri, at tað nógva vatnið í ánni Elben fer at avbyrgja sjúklrahúsini. Samstundis boðaðu myndugleikarnir frá, at teir eru til reiðar at flyta 3.600 fólk afturat úr býnum, verður tað neyðugt.

Fleiri smáar áir renna eisini í gjøgnum Dresden, og sambært býarmyndugleikunum er so nógv vatn í hesum áunum og í Elben nú, at vatnflóðin er tann ringasta har síðani 1845.

Dresden varð at kalla bumbaður í sor undir seinna heimsbardaga. Nakrir gamlir bygningar og gomul torg eru tó eftir, men í gjár stóðu torgini undir í vatni, og í nógvum bygningum stóð nógv vatn í kjallaranum. M. a. stóð kjallarin á tí kenda Semperoperahúsinum undir í vatni, men tað eydnaðist bjargingarfólki at bjarga listaverkunum á teirri kendu Zwinger-borgini, áðrenn vatnið kom hagar. Listasavnið í Dresden er eitt tað størsta í Evropa.

Týski kanslarin, Gerhard Schrøder, var í Dresden mikudagin. Hann segði seg ongantíð hava sæð slíka vatnflóð og gav alt fyri eitt lyfti um, at stjórnin fer at játta 2,2 milliardir krónur í hjálp til tey raktu.

Týsku myndugleikarnir siga, at vatnflóðin kann eisini elva til eina umhvørvisvanlukku, tí við býin Bitterfeld hóttir vatnflóðin tær nógvu kemisku verksmiðjurnar, sum har eru. Í og kring Bitterfeld eru einar 350 kemiskar verksmiðjur.

**25 sentimetrar eftir**

Í kekkiska høvuðsstaðnum Prag er vatnið farið at minka í ánni Moldau, men tað fara at ganga fleiri dagar, áðrenn tey 50.000 fólkini, sum máttu flytast burtur, sleppa heimaftur. Býarmyndugleikarnir í Prag siga, at tað var um reppið, at tann gamli miðbýurin varð lagdur undir í vatni. Sambært borgarstjóranum vóru 25 sentimetrar eftir av byrgingini, tá vatnið fór at minka aftur.

Í Eysturríki eru bjargingarlið, løgreglumenn og hermenn farnir undir at rudda, sjálvt um fleiri býir framvegis standa undir í vatni. Samstundis verður boðað frá, at tað nógva vatnið í Donau-ánni nú eisini hóttir partar av Slovakia. Har hevur stjórnin sent fleiri túsund hermenn at gera byrgingar fyri at verja tann gamla býarpartin í høvuðsstaðnum Bratislava.

Vatnflóðin í Evropa og syðra parti av Russlandi hevur kravt í minsta lagi 90 mannalív og gjørt skaða fyri nógvar milliardir krónur.



*Her í Prag er vatnið farið at minka í ánni Moldau, men tá vóru bara 25 sentimetrar eftir at byrgingini, sum vardi tann gamla býarpartin*

# Putin ætlar at gera Russland størri

**Russar skulu møguliga á fólkaatkvøðu um at leggja Hvítarussland afturat Russlandi**

RUSSLAND
*Árni Joensen*

Mikudagin var hvítarussiski forsetin, Aleksandr Lukasjenko, í Moskva. Har hitti hann russiska forsetan, Vladimir Putin, og høvuðsevnið á fundinum var ein ætlan um at leggja tey bæði londini saman.

Eygleiðarar í Moskva siga, at Putin vísti seg at hava munandi størri áhuga fyri ætlanini, enn hann fyrr hevur havt. Fyrr hevur Putin tosað um at økja samstarvið við Hvítarussland og kanska at skipa eina samgongu, men mikudagin tosaði hann um at skipa londini sum eitt ríki. Við tíðindafólk segði Putin, at sjálvur kundi hann hugsað sær at spurt russiska fólkið, hvat tað heldur um ætlanina.

Lukasjenko hevur leingi verið talsmaður fyri at knýta Hvítarussland tættari at Russlandi, men hann hevur tó ikki tosað um eitt og sama ríki, sum Putin nú ger. Lukasjenko hevur fyrr mælt til tættari búskaparligt og politiskt samstarv, og eygleiðarar í hvítarussiska høvuðsstaðnum Minsk halda ikki, at Lukasjenko er sinnaður at fara so langt sum starvsfelagin í Moskva.





*Hugskotið aftan fyri luksusíbúðarskipið er, at »tú kanst ferðast um allan knøttin uttan at fara frá húsum«. Skipið steðgar á Havnini fríggjadagin í næstu viku*

# Ferðast uttan at fara frá húsum

**Fríggjadagin kemur »heimsins fyrsti flótandi luksusíbúðarblokkurin«, The World, á Havnina**

FERÐAMANNASKIP
*Eirikur Lindenskov*

Tað er vorðin gerandiskostur at síggja stásilig útlendsk ferðamannaskip við oyggjarnar, og flestu teirr vitja Havnina.

Mikudagin komandi kemur kenda skipið, Rotterdam, á Havnina. Hetta er triðja summarið, at Rotterdam vitjar í Føroyum, og eins og undanfarin ár, er tað Tor Shipping í Havn sum er umboð teirra.

Tor Shipping umboðar nógv ferðamannaskip, og fær felagið í hesum sambandi seriga uppgávu komandi fríggjadag, tá spildurnýggja ferðamannaskipið, »The World« kemur á Havnina.

Tað er ikki bara tað, at skipið er nýtt. Talan er um eitt heilt serligt skip, tí hetta er tann fyrsti flótandi luksusíbúðarblokkurin í heiminum, og skipið er bygt eftir hugtakinum: »ferðast um allan knøttin uttan at fara frá húsum«.

Umborð eru 110 rúmligar eigaraíbúðir og 88 gestasuitir.

»The World« siglir um allan heimin, og skráin er løgd soleiðis til rættis, at fylgt verður tí góða veðrinum.

Skipið er bygt á Fosen Mek Verksteder skipasmiðjuni í Noreg, og tekniskur leiðari er norska Bergshav Management. Bergshav Management eigur oljutangaskipið »Bergina«, sum er skrásett í Føroyum, og sum Tor Shipping rekur.

Trygdarsamskiparin fyri bæði »The World« og »Bergina« er føroyingur, sum arbeiðir hjá Bergshav Management.

»The World« kemur á Havnina kl 8 fríggjamorgunin 23. august og fer avstaðaftur kl 18 sama kvøld. Frá Tor Shipping siga tey seg vóna, at bæði íbúgvar og manning á »the world« fáa ein væleydnaðan og ógloymandi steðg í Føroyum.

Tey, ið hava áhuga í at frætta meira um skipið, kunnu hyggja á www.residensea.com.

# Eyðun av Reyni í Focus

LISTAFRAMSÝNING
*Eirikur Lindenskov*

Í dag kl 16 letur upp listaframsýning við oljumálningum hjá Eyðuni av Reyni í nýggja gallarínum, Gallerí Focus í Grím Kambansgøtu í Havn – ella í »Konradsbrekku«, sum eldri havnarfólk rópa gøtuna.

– Hann sýnir fram 26 stórar og smáar oljumálningar, sigur Marianna Norðoy, gallaríeigari.

Gallarí Focus lat upp í juli, og fyrstur at sýna fram var Bárður Jákupsson.

Marianna Norðoy letur væl at vitjanunum á nýggja gallarínum.

– Nógv fólk vóru og vitjaðu framsýningina hjá Bárði Jákupsson – eisini nógv ferðafólk, sum eisini keypa málningar, sigur hon, og leggur afturat, at úr Danmark verður skipað fyri fleiri ferðum til Føroya fyri listaáhugað fólk, og tey støkka sjálvandi inn á gólvið.

Framsýningin í Gallerí List er opin týsdag til fríggjadag frá kl 14 – 18. Leygardag er opið frá 16 tl 18 og sunnudag og mánadag er stongt.

Næsti framsýnari verður Jóna Rasmussen, hon sýnir fram í september. Í Oktober fer Amariel Norðoy at sýna fram, og í november verður framsýning við málningum hjá Zachariasi Heinesen.

Ferniseringin hjá Eyðuni av Reyni verður í dag frá kl 16 til 18.




*Marianna Norðoy í nýggja Gallarí Focus, sum lat upp í juli. Í dag letur upp framsýning við oljumálningum hjá Eyðuni av Reyni*

# Kann ikki vera trupulleiki hjá Tjóðveldisflokkinum

**– Vit kunnu einki gera við málið um skuldsetingarnar móti løgmanni. Hatta mugu Tórbjørn Jacobsen og løgmaður greiða sjálvir, sigur Heini O. Heinesen, formaður í tingbólki Tjóðveldisfloksins. Flokkurin ger ikki meira við málið**

STRÍÐ UM LØGMANN
*Eirikur Lindenskov*

Tað kann ikki verða ein trupulleiki hjá Tjóðveldisflokkinum, at Tórbjørn Jaobsen hevur skuldsett løgmann og Jørgin Niclasen fyri ikki at kenna mun á sínum og annara.

Tað sigur Heini O. Heinesen, formaður í tingbólki Tjóðveldisfloksins.

Tingmanning floksins hevur havt fund um málið, eftir at aðalstjórn Tjóðveldisfloksins á fundi leygardagin tók málið upp sum eitt flokspolitiskt mál, hóast Høgni Hoydal alla tíðina hevur sagt, at talan er um eitt persónligt stríð millum Tórbjørn Jaocbsen og Anfinn Kallsberg.

– Vit eru sjálvandi hørm um støðuna – og serliga hørm um, at Tjóðveldisflokkurin sum flokkur verður drigin upp í málið, sigur Heini O. Heinesen. Hann heldur, at ikki minst Óli Breckmann hevur roynt at fáa Tjóðveldisflokkin at geva løgmanni »bláa stemplið«, men tað kann flokkurin ikki gera, sigur hann.

– Tað er sjálvsagt keðiligt fyri løgmansembætið, at slíkur ivi verður reistur – eisini tað, at tað er ein tingmaður hjá einum samgonguflokki, sum reisir ivan. Men tað kann ongantíð verða uppgávan hjá Tjóðveldisflokkinum at geva Tórbjørni Jacobsen munnkurv ella líknandi, sigur Heini O. Heinesen.

Hann leggur afturat, at hetta eru vaksnir menn, og at teir mugu greiða handan trupulleikan sjálvir.

Heini O. Heinesen er ikki sinnaður at verða við til at seta eina grein 19 nevnd at kanna fortíðina hjá løgmanni. Hann hevur sjálvur sitið í einastu grein 19 nevnd, sum hevur verið sett eftir galdandi stýrisskipan, tann sum kannaði tað, sum fór fram í áttatiárunum. Út frá arbeiðinum har og teirri løgfrøðisligu ráðgeving, tey tá fingu, dugir hann ikki at síggja, ein ein slík nevnd kann setast at greiða málið um fortíðina hjá løgmanni.

Sostatt ger Tjóðveldisflokkurin einki við málið um løgmann.

– Men kemur okkurt annað fram seinni, so taka vit sjálvandi støðu til tað, sigur Heini O. Heinesen.



*Tjóðveldisflokkurin ger ikki meira við málið um skuldstingarnar móti løgmanni. Eftir at aðalstjórn floksins viðgjørdi málið leygardagin, hevur tingbólkur floksins eisini viðgjørt tað, og semja er um, at flokkurin einki ger við málið, sigur Heini O. Heinesen, formaður tingbólksins*